

# Statoil og West Hercules eydnuna við sær í New Foundlandi

**Jan Müller**

12.11.2015 - 23:08

Oljan.fo

Tá boripallurin West Hercules fór av Skálafjørðinum í fjør og setti kós móti New Foundlandi, skuldi pallurin vera við í eini størri boriætlan, har Statoil longu hevði funnið nógva olju. Líkt er nú til, at hendan boriverkætlanin gongur væl, nú Statoil setur enn størri orku inn í hesum sama økinum og hevur eydnuna við sær at fáa fleiri nýggj leitiloyvi.

Statoil kunnger i kvøld, at felagið hevur fingið tillutað seks leitiloyvi afturat í Flemish Pass økinum í New Foundlandi og tvey leitiloyvi í Nova Scotia. Konsernstjórin fyri leiting, Tim Dodson, sigur i tíðindaskrivi, at hetta er við til at styrkja støðuna hjá Statoil í hesum økinum, sum felagið nú roknar sum eitt kjarnuøki